sólorka
FØROYSKA GRANNALAGIÐ Í SÓLINI



Bið um eitt tilboð:
solorka@solorka.com
ella tlf. 221090



# Skúlar og ungdómur



Sólorka býður skúlaflokkum á vitjan her á spanska Costa Blanca. Vit kunnu seta saman skráir, sum hóska til aldur tykkara og endamálið við vitjanunum. Her ber til at vitja mong søgulig støð og søvn og nógvar merkisstaðir, ið fevna frá gomlum skansum til fullfíggjaða modellið av heimsins best útgjørda krígsskipi frá 18. øld.



Møguleikarnir fyri eini virknari vitjan eru eisini ótaldir. Tit kunnu sleppa at heinta appilsinir í eini privatari lund og pressa tykkara egna djús. Tit kunnu vitja stóra garðin, har tey ala eina rúgvu av tarvum. Tit kunnu sleppa á flot, klatra, at royna river-rafting, kajak- ella kanorógving og mangt annað. Tit kunnu eisini dansa og hava tykkara egnu hugnakvøld. Kanska skaðar tað heldur ikki, at vit her í Sólorku hava oman fyri 300 sólskinsdagar um árið ☺.



**Ferðing & gisting**

- Vit bjóða flúgving beinleiðis til og úr Spania við Sólorku-flogførunum í flúgvitíðarskeiðum okkara...ella hjálpa við lagaligastu ferðingini
- Vit veita innivist, skipa fyri bussflutningi otl.



**Aktivitetur & upplivingar**

- Vit skipa fyri eini ørgrynnu av aktivitetum av øllum møguligum slagi, eitt nú team-bulding, klatring, rafting, ítrótt av ymsum slagi, sigli-túrum o.m.ø.



**Útferðir & tiltøk**

- Vit skipa fyri útferðum og vitjanum av ymsum slagi, og vit veita atgongd til mentanartiltøk, konsertir, framførslur og onnur tiltøk